# Samband

Felags teldupostur:
midnam@sernam.fo

Annika Helgadóttir Davidsen
Miðnámsskúlarnir í Klaksvík, Vestmanna og á Kambsdali
Teldupostur: annikad@sernam.fo
Tlf.: 292214

Súsanna Olafsdóttir Skaale
Miðnámsskúlarnir í Tórshavn og í Hovi
Teldupostur: susanna@sernam.fo
Tlf.: 292215

# Sálarfrøðiligt tilboð

## Skúlaárið 2015-2016

Sálarfrøðiliga tilboðið er ætlað næmingum á miðnámsskúlunum kring landið, og hevur til endamáls at hjálpa næminginum at gjøgnumføra útbúgvingina hóast møguligar sálarligar forðingar.

sernám

## Sálarfrøðiligt tilboð

Tilboðið, ið allir miðnámsskúlanæmingar kunnu gagnnýta, er ókeypis og fevnir um 2-5 samrøður við sálarfrøðing.

Sálarligar forðingar kunnu gera tað torført hjá næminginum at halda áfram við lestrarlívinum. Næmingurin avger sjálv/ur, hvørji evni verða tikin upp í samrøðunum, men forðingarnar kunnu m.a. verða tengdar at:

- Einsemi, angist, tunglyndi, strongd

Ætlanin er eisini at hava tilboð um samrøður í bólki, um nóg stórur áhugi er fyri hesum.

## Fyribyrgjandi arbeiði

Umframt samrøður við næmingar fevnir tilboðið um upplýsandi og fyribyrgjandi tiltøk á skúlunum, har vit tosa við næmingarnar um góða sálarheilsu.

## Samtykki

Fyri næmingar undir 18 ár krevst samtykki frá øðrum av foreldrunum ella verja—tó uttan at tey fáa innlit í samrøðurnar.

## Tagnarskylda

Sálarfrøðingurin hevur tagnarskyldu, sum merkir, at næmingurin avger, um nakar annar enn sálarfrøðingurin fær innlit í tey evni, sum hon ella hann velur at taka upp.

## Ávísing

Næmingurin skal fyrst seta seg í samband við lestrarvegleiðingina á skúlanum, sum ávísir næmingin til sálarfrøðingin. Næmingurin og sálarfrøðingurin meta saman um, hvør besta hjálpin er fyri næmingin.

## Staðseting

Sálarfrøðingarnir hava møguleika fyri at hava samrøður á skúlunum og í hølum hjá Sernám í Tórshavn.

